# Nøvn

## Føðingar

10. januar fingu Benjamin og Madikken eina lítlasystur. Hon eitur Melissa Angelica, vigaði 3885 gr. og var 52 cm long. Foreldrini eru Sølvi Viola og Frói Jacobsen og búgva tey í Ålesund.

23. januar fingu Anna Petersen og Pauli G. Hansen, Skála, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

28. januar fingu Sunniva Bjarnastein og Páll Olaf Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3800 gr.

28. januar fingu Anna Maria og Jóan Petur Joensen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

30. januar fingu Maibritt P. Mortensen og Jann Fríði á Regni, Toftum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3300 gr.

30. januar fingu Mia Nielsen, Glyvrum, og Rógvi Højgaard, Saltangará, eina dóttur. Hon var 55 cm langur og vigaði 4270 gr.



*1. januar fingu Elly Djurhuus og Gunleif Djurhuus, Aalborg, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3670 gr.*

### TØKK

Hjartans tøkk fyri sýnda umsorgan og samkenslu,
tá kæra kona mín

**Kristianna Joensen**
**Leirvík**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkini á B6/Palliativa deild á Landssjúkrahúsinum, Nærverkið í Eysturoy og familju hennara, sum vóru so væl um hana og okkum ta seinastu tíðina.
Tøkk til Sverra Steinhólm, Marius Jacobsen og Berg D. Joensen fyri troystarrík orð í kapellinum og í Leirvíkar kirkju.
Tøkk til Leif og Jónsvein fyri yndisligan sang og tónar.
Somuleiðis tøkk til kirkjutænarar, forsangarar, organist í kapellinum, líkvognskoyrara og gravara og ikki minst tykkum, ið stóðu fyri og hjálptu til við ervinum, og tykkum, ið mintust hana við kransum, blómum og við gávum til Krabbameinsfelagið.
Ein serlig tøkk til tín Marianna, sum hevur staðið við mína lið hesar tungu dagar.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.
Takk fyri hjálp, heilsanir, troystarrík orð og má Harrin signa tykkum øll.

*Familjunnar vegna*
**Jógvan Elias**

### TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá kæri pápi, verpápi og abbi okkara

***Jóhannes Holm Jacobsen***
**Hvalba**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til øll á sambýlinum í Hvalba, sum vórðu um hann ta tíðina, hann var har. Tøkk fyri blómur, kransar og fyri peningagávur til Zarepta. Tøkk fyri hjálp til jarðarferðina og ervið og til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jóna og Dávur**

# Oljusamstarv millum Føroyar og Grønland

Bæði grønlendski landsstýrismaðurin í oljumálum, Karl Ove Berthelsen og stjórin í grønlendsku ráevnisfyrisitingini, Jørn Skov Nielsen halda, at Føroyar og Grønland eiga at samstarva, nú bæði londini hvør í sínum lag royna at finna kolvetni í undirgrundini. Hetta kemur fram í sending í Rás2 mánamorgunin klokkan 9.15, tá Jan Müller tosar við teir báðar á samkomu í Nuuk, í sambandi við at leitiloyvi herfyri vórðu latin altjóða oljufeløgum. Teir halda tað vera upplagt at bæði londini arbeiða saman, nú bæði londini royna at finna kolvetni í undirgrundini og í nógvum eru í somu støðu.

Sendingin verður endursend næsta leygardag kl. 11.



**Jørn Skov Nielsen, stjóri fyri ráevnisfyrisitingina í Grønlandi**
Mynd Jan Müller




**Karl Ove Berthelsen, landsstýrismaður í oljumálum ynskir samstarv við føroyingar um oljumenning**
Mynd Jan Müller

## 25 ára starvsdagur

Týsdagin 1. februar hevði Jóhanna Vang arbeitt á skrivstovuni og í bókhaldinum á Sosialinum í 25 ár.

Starvsfelagarnir heiðraðu Jóhonnu við hugnaløtu í Vágsbotni. Á myndini takkar Eirikur Lindenskov, ábyrgdarblaðstjóri, Jóhonnu fyri dygga arbeiði hennara hesi 25 árini.

Jóhanna býr í Kvívík. Er gift við Jens Kristiani Vang, myndamanni. Tey eiga trý børn, Karstin, Oddvør og Jóhan Kára.

